# Evnisdagar í samband við kommunuvalið 2020 (8.-10. flokkur)

*Mánadagur 9. og týsdagur 10. november 2020*

Mána- og týsdagin í komandi viku eru evnisdagar á skrá í 8.-10. flokkunum. Evnið er kommunuvalið. Leiðslan ger eina ætlan yvir, hvør hevur ábyrgd av hvørjum flokki. Har, sum tað ber til, er tað samfelagsfrøðilærarin.

Um møguligt kundi onkur lærari tikið eina løtu í morgin, fríggjadagin 6. november, í flokkunum (avtala í toyminum), at næmingarnir fingu eina løtu at fyrireika nakrar spurningar. Hvat halda tey, man átti at arbeitt við á Tvøroyri? Hvat manglar? Hvat vilja valevnini gera við okkurt ávíst øki?

**Mánadagur 9. november 2020 – skrá:**

Kl. 08.00: Veljarakanning (sí fylgisskjal 1; velja lista (ikki valevni); lær. telja upp)

Flokkarnir fáa kunning um kommunuval (sí fylgisskjal 2)

Hugarok: Hvat er týdningarmikið at arbeiða við á Tvøroyri? (skriva á talvuna)

Kl. 09.30: Steðgur/fríkorter

Kl. 09.50: Valevni vitja (okur hava boðið tveimum pr lista; tey vitja (rotera) hjá 8.a og b (saman), 9. a og b (saman) og 10. flokki). Fortelja hví tey stilja upp, og hvørji hjartamálini eru. Kunnu svara spurningum frá næmingunum. 15 minuttir hvørt stað?

Kl. 11.20: Steðgur/fríkorter

Kl. 11.45: Okur stilla upp! Næmingarnir fara í bólkar og skulu skipa egnar valevnislistar.

- Hvat skal listin eita?
- Hevur listin eitt slagorð?
- Valskrá – hvat vilja okur arbeiða við? Skriva/ger ein faldara!
- Møguliga plakatir og annað?

Kl. 12.30: Takk fyri í dag!

**Týsdagur 10. november 20202 – skrá:**

Kl. 08.00: Arbeiðið frá í gjár verður uppafturtikið!

Kl. 09.30: Steðgur/fríkorter

Kl. 09.50: Framløgur fyri hinum (leistur verður avgjørdur av næm./lær.)

Kl. 11.20: Steðgur/fríkorter

Kl. 11.45: Okur fara á val!

Hvønn lista á Tvøroyri hevði tú valt, um tú hevði valrætt í dag? (fylgisskjal 1)

Hvønn lista í Tvøroyrar skúla hevði tú valt? (fylgisskjal 3)

Uppteljing og valúrslit almannakunngjørd!

Kl. 12.30: Takk fyri í dag!